Hetlendingar fegnast um Norrönu:

# Sera góð íløga fyri Hetland

**Hetlendingar hava sett nógvar pengar í Norrönu, tí teir halda, at hetta er ein skilagóða íløga, sum eisini fer at síggjast aftur í Hetlandi. Sosialurin hitti tveir av oddamonnunum har**

NÝGGJA NORRÖNA
*Jan Müller*

– Eg eri ein sera fegin maður í dag. Hetta er eitt frálíkt skip. Hetta er ein góð verkætlan. Og eg haldi, at vit gjørdu tað rætta sigur »løgmaðurin« í Hetlandi, Tom Stove, sum varð millum ferðafólkini á fyrsta túrinum við Norrönu úr Týskalandi til Føroya og víðari til Hetlands. Tom Stove er júst »afturvaldur« í enn eitt fýra ára skeið at leiða Hetland inn í framtíðina. Val er í Hetlandi í mai og eingin hevur stillað upp ímóti Stove. Hann hevur verið »convenor« t.v.s. ovasti í lokalstýrinum í Hetlandi seinastu fýra árini og hevur tí eisini havt møguleika at fylgja við og vera við til at ávirka gongdina í málinum um ferðamannaskipið Norrönu.

Norröna hevur stóran týdning fyri Hetland sigur Tom Stove. Her hugsar hann ikki minst um tað at fáa samband við fleiri onnur lond við einum skipi, sum er so mikið stórt, at tað kann flyta allan farm og ferðafólk, sum tørvur er á, og so eisini á einum støði, sum tíðin krevur.

Tom Stove trýr uppá, at leiðin hjá Norrönu fer at fáa enn størri undirtøku, nú nýtt skip er komið. Hann sær fyri sær, at nógv fleiri bretar og skotar fara at leggja leiðina úr Aberdeen til Lervick og síðani víðari til Føroya og Ísland ella til Bergen í Noregi. – Fólk vilja ikki bara hava sól. Tey vilja eisini hava nýggjar náttúrupplivingar og tað fáa tey við at brúka Norrönu. Hetta er ein góð íløga, sum vit vóna fer at bera seg og vera til frama bæði føroyingar og hetlendingar.

### Møguleikar

– Hetta er fyrst og fremst ein stór løta fyri føroyingar, men hetlendingar eru eisini sera fegnir um at vera við í hesi verkætlan sigur umboðið hjá Hetlandi í nevndini í Smyril Line, Morgan Goodlad, sum var við á fyrsta túrinum hjá Norrönu úr Lübeck til Føroya og eftir tað til Hetlands. Morgan Goodlad umboðar hetlendska partapeningin í Smyril Line uppá 50 mill. kr. Hann er eisini ovasti embætismaðurin í hetlendska heimastýrinum og formaður í fleiri av ríku oljugrunnunum.

Morgan er sera fegin um nýggja skipið og ivast ikki í, at tað fer at fáa avgerandi týdning fyri oyggjasamfeløgini í Norðuratlantshavi. Hann viðgongur, at tað verður tungt at reka skipið, men hetlendingar høvdu ikki gjørt hesa íløguna, um teir ikki mettu hana skilagóða. Hann roknar við, at íløgan teir hava gjørt fer at síggjast aftur í Hetlandi uppá longri sikt.

Hann sær góðar møguleikar við hesum betraða infrastrukturinum at menna flutningin millum londini í Norðuratlantshavi og so meginlandið eitt nú gjøgnum Lervick. Eisini ferðavinnan kann fáa eitt veruligt skump og sær hann fyri sær, at ferðafólk úr Bretlandi og Hetlandi fara at brúka Norrønu og at ferðafólk eisini fara at fara øvugta vegin og vitja í Hetlandi og Skotlandi.

Uppá fyrispurning um tíðirnar kunnu gera at neyðugt verður at koyra meira partapening í felagið sigur Morgan, at teir hava tilrættalagt alt so væl, at teir síggja ikki nakra orsøk til hetta sum er. – Vit vita øll, at hetta er eitt stórt skip. Men roynir tú einki nýtt, so kemur tú heldur onga veg víðari. Eg h aldi vit skulu vera eitt sindur varin við bara at fokusera uppá tað negativa. Soleiðis er tað eisini í Hetlandi. Fólk velja heldur ivan og pessimismu enn bjartskygni. Hetta eru jú ein stór løta fyri bæði samfeløgini, og eg haldi vit eiga at vera fegin og trúgva uppá, at hetta fer at ganga.

Morgan Goodlad sær fyri sær stórar møguleikar at menna samvinnuna millum Hetland og Føroyar, nú hetta eru næstu grannar.



*Morgan Goodlad, er ovasti embætismaðurin í hetlendska heimastýrinum og umboðar hetlendska partapeningin í nevndini í Smyril Line. Hann sær stórar møguleikar í Norrönu.*
*Mynd: Jan Müller*




*Tom Stove er hetlendski »løgmaðurin« og sær stórar møguleikar í nýggju Norrönu. Her er hann uttanfyri »Simmer Dim«, sum á hetlendskum stendur fyri »summardimmi« og er heitið á tí fínastu matstovuni umborð á Norrönu.*
*Mynd: Jan Müller*



*Stjórin á Flender Werft handar teimum trimum »Norrönunum«, konunum hjá Jónasi Hallgrimsyni úr Íslandi, Morgan Goodlad úr Hetlandi og Óla Hammer úr Havn gávu við handina av skipinum í Lübeck.*
*Mynd: Jan Müller*






*Jónas Hallgrimsson, sum hevur fylgt Norrönu frá byrjan, her saman við øðrum á sóldekkinum á nýggju Norrönu fyri at veitra eitt seinasta farval til ta gomlu.*
*Mynd: Jan Müller*

# Norröna stóran týdning fyri Ísland

NÝGGJA NORRÖNA
*Jan Müller*

Jónas Hallgrimsson er ein av teimum, sum hevur størstu orsøkin til at fegnast um nýggju Norrönu, tí hann hevur verið við frá byrjan. Hann hevur trúð uppá hesa verkætlan seinastu 30 árini, líka síðani at Smyril varð keyptur.

– Hetta er frálíkt. Man er rørdur sigur maðurin,. sum tók ímóti Smyrli, tá skipið kom á Seyðisfjørð 16. juni 1975. Tá var Óli Hammer 1. stýrimaður. Jónan hevur verið nevndarformaður í Smyril Line í mong ár. Í dag er hann nevndarlimur. Hann er sum so eisini ein av undangongumonnunum aftanfyri Norrönu í Íslandi og hevur gjørt eitt stórt arbeiði á Seyðfjørðinum at skapa áhuga fyri Norrönu.

Hvat merkir hetta nýggja og stóra skipið fyri Íslandi: – Tað hevur alstóran týdning fyri íslandi. Fyri Seyðisfjørð og Eysturlandið og Norðurlandið, har tað verða gjørdar stórar íløgur fyri at taka ímóti ferðafólkinum við Norrönu. Hetta betýðir ótrúliga nógv fyri Ísland.

Tá vit nema við spurningin um hvussu tað fer at ganga at svara eini so stórari íløgur sigur hann: – Eg vóni ikki tað verður neyðugt at seta fleiri pengar í men verður tað neyðugt, so mugu vit meta um tað. Hann er tó á ongan hátt í iva um, at henda ferðaleiðin fer ongantíð at detta niðurfyri. Norröna er komin fyri at blíva.




*Jónas Hallgrimson er ein errin maður í dag. Hetta er tað hann hevur stríðst fyri seinastu 25 árini. Loksins er komið á mál og vit eiga øll at vera stolt sigur hann.*
*Mynd: Jan Müller*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður:

# Fegnast um at útlendingar vilja gera íløgur í Føroyum

**– Vit eiga ikki at undirmeta týdningin av, at vit hava frían kapitalflutning. At bæði hetlendingar og íslendingar hava sett pengar í skipið eigur at vísa okkum, at onnur síggja møguleikar her, og at Føroyar sum íløguøki ikki er uttan áhuga**

NÝGGJA NORRÖNA
*Jan Müller*

– Hetta er eitt sera stórt og positivt átak. Gamla Norröna var ikki tíðarhóskandi longur, og Smyril Line varð tvungið til at skifta skipið út sigur landsstýrismaðurin í ferðamálum Bjarni Djurholm, sum var við fyrsta túrin við nýggju Norrönu.

Hann viðgongur, at føðingin hevur verið eitt sindur turbolent. Tað er bara at vóna, at íleggjararnir og felagið sjálvt fáa tað burtur úr sum teir hava sett sær sum mál.

– Hetta er ein stór uppgáva. Man vónar og biðjur eftir, at tað fer at hepnast. Koma teir undan tey fyrstu árini so er sloppið, eri eg sannførdur um.

Bjarni Djurholm er ikki sinnaður at tosa um møguleikan fyri at seta almennar pengar í Norrönu í framtíðini, um alt skuldi gingið galið.

– Fyrst vil eg síggja ta støðuna, áðrenn eg úttali meg. Men sum útgangsstøði so vil landið heldur avvikla síni vinnuligu engagement enn at taka nýggj á seg. Hyggja vit at støðuni hjá rækjuflotanum kveppa menn seg við at fara inn við skipanum av ymsum slag, so tað má síggjast í eini heild. Sum útgangsstøði er tað ikki indiskutabult men nakað sum líkist tí.

Landsstýrismaðurin heldur tó ikki, at vit eiga at undirmeta týdningin av, at vit hava frían kapitalflutning. At bæði hetlendingar og íslendingar hava sett pengar í skipið eigur at vísa okkum, at onnur síggja møguleikar her, og at Føroyar sum íløguøki ikki er uttan áhuga. So tá fólk síggja skipið er ikki óvist, um tey ikki eisini vilja seta kapital í. Tað er so nakað nevndin má taka støðu til. Men jú meiri innskotskapitalur er í tess betri er tað fyri tað samlaða projektið.

Bjarni Djurholm sigur, at eingin ivi er um, at vágin veksur proportionalt við kostnaðinum av skipinum. Nevnd og leiðsla eru samd um, at hetta er tann rætta loysnin. So er at vóna, at tað heldur. Gangi út frá at man setur nyttuna upp móti kostnaðinum og man hevur valt eina optimala loysn.

Men fortreytirnar kunnu broytast. Vit síggja at útflutningurin av alifiski er broyttur í mun til støðuna sum var áðrenn. Møguliga hava teir tikið hædd fyri hesum.

Hetta er eitt stórt tak og tað skulu takast nøkur øgilig tøk fyri at fáa hetta at bera til. Tað vóni eg eisini fer at eydnast



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður umborð á nýggju Norrönu.*
*Mynd: Jan Müller*

